# Dansk Kulturinstitut peikar á føroyskan serskúla

**10 enskir serlærarar vórðu vístir til Fjordskolen, tá teir vóru í Danmark og leitaðu sær íblástur til teirra arbeiði í Onglandi. – Fantastiskt konsept, søgdu teir eftir vitjanini á serskúlanum hjá Ingvald á Kamarinum**

SKÚLI
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Ingvald á Kamarinum er ikki sørt errin í hesum døgum. Hann er leiðari á Fjordskolen í Holbæk, Danmark. Ein privatur serskúli fyri næmingar við atferðartrupulleikum. Ein skúli, sum um dagarnar fekk prógv fyri, at hann telist millum bestu serskúlarnar í Danmark.

Mikudagin í farnu viku fekk skúlin forkunnuga vitjan. Tíggju serlærarar úr Onglandi løgdu høvdu sett ein heilan dag av til vitjan á Fjorskolen, soleiðis at teir kundu síggja hvussu Ingvald á Kamarinum og hini á skúlanum arbeiða í dagligdegnum.

### Føroyskar metodir

Tað er Det Danske Kulturinstitut og British Council, ið samskipa túrin hjá onglendingunum, sum leita sær íblástur til teirra dagliga arbeiði í Onglandi. Teir skulu bert vitja ein serskúla, og Det Danske Kulturinstitut peikaði altso á Fjordskolen fram um aðrar serskúlar í Danmark.

– Skúlan hava vit fingið viðmældan frá støðum, sum arbeiða við børnum við somu trupulleikum, segði samskiparin Helle Rønne frá Det Danske Kulturinstitut við Venstrebladet í farnu viku. Det Danske Kulturinstitut er ein stovnur, sum umvegis danska Mentamálaráðið fær árliga statsjáttan.

At Det Danske Kulturinstitut velur Fjordskolen fram um aðrar líknandi skúlar í Danmark, fegnast Ingvald á Kamarinum sjálvsagt um.

– Jamen tað er gott at hoyra, at onkur virðismetir tað arbeiði, vit gera, sigur Ingvald á Kamarinum sambært blaðnum. Hann vísir í greinini á, at skúlin í stóran mun er skipaðir eftir føroyskum "metodum", sum tikið verður til. – Og tað riggar væl í Danmark, sigur Ingvald á Kamarinum.




*»Englændere begejstrede for Fjordskolen« skrivaði Venstrebladet í farnu viku*

### Ynskja Ingvald til Onglands

Ingvald á Kamarinum gleddi seg sjálvsagt til forkunnugu vitjanina. Tá mikudagurin var av, vóru tað onglendingarnir sum gleddust. – Eitt fantastiskt konsept, søgdu teir millum annað.

– Eg haldi Fjordskolen við 17 næmingum hevur eina góða støðd. Eg haldi eisini skúlin hevur nøkur frálík hugskot, tá tað kemur til at "fanga" næmingarnar, segði Dan Rowell frá Sacred Heart Catholic High School, ein gentuskúli við 1200 næmingum, við Ventrebladet mikudagin.

Tað var altso »lutter roser«, sum Venstrebladet tekur til, til Fjordskolen. Nakrir av lærarunum spurdu enntá Ingvald, um hann ikki hevði ætlanir um at opna ein líknandi skúla í Onglandi, tí so høvdu teir søkt um starv har.

– Hetta er ein góð kensla. Vit eru errin skúlans vegna, og næmingarnir hildu tað vera spennandi, at fólk eru komin allan vegin úr Onglandi at vitja okkum, sigur Ingvald á Kamarinum.

# Mentamálaráðið svarar ikki

**Ingvald á Kamarinum hevur gjørt eitt útkast til, hvussu ein serskúli í Føroyum kann síggja út, men úr Mentamálaráðnum hoyrir hann ikki eitt orð**

MENTAN
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Ingvald á Kamarinum hevur saman við øðrum frá Fjordskolen verið í Føroyum og kunnað um virksemi sítt. Millum annað var kunnandi fundur í Miðlahúsinum í Vágsbotni, har nógv fólk vóru og lýddu á. Eisini hevur Ingvald á Kamarinum verið á fund við Mentamálaráðið og greitt frá sínum virksemi, umframt at hann hevur gjørt eitt útkast til teirra um, hvussu ein serskúli sum Fjordskolen kann skipast í Føroyum.

– Men eingin svarar upp á nakað. Tað er støðan beint nú. Um tú ringir ella skrivar, har er eingin reaktión, ikki eitt orð, harmast Ingvald á Kamarinum. Hann vildi heldur enn fegin hjálpt til við at fingið ein serskúla upp at standa í Føroyum, og hann sigur seg eisini vita, at tað er stórur tørvur á einum tílíkum tilboði.



*– Tá fólk koma úr Onglandi at hyggja eftir okkara virksemi, so undrist eg á hvør orsøkin er, at Mentamálaráðið ikki reagerar upp á mínar fyrispurningar, sigur Ingvald á Kamarinum*
*Mynd: Rólant Waag Dam*

– Tað er heilt víst brúk fyri slíkum. Og út frá samrøðum við foreldur og skúlaleiðarar í Føroyum veit eg, at talan er um millum 60 og 100 føroysk skúlabørn, sum í øllum førum mangla eitt tílíkt tilboð, sigur Ingvald á Kamarinum. Tí undrast hann eisini á, at einki sær út til at henda á økinum.

– Tá fólk koma allan vegin úr Onglandi at hyggja eftir okkara virksemi, so undrist eg á hvør orsøkin er, at Mentamálaráðið ikki reagerar upp á mínar fyrispurningar og útkast. Møguliga meta tey, at Fjordskolen ikki er eitt nóg gott tilboð. Men so mugu tey hava eitt betri alternativ.

– Ella er tað rætt og slætt vantandi áhugi teimum børnum, sum hava tørv á hesum sertilboðum. Kanska heldur man tað er í lagi, at støðan í føroyska fólkaskúlanum er sum hon er, sigur Ingvald á Kamarinum spyrjandi.

– Í hvussu so er haldi eg tað vera vánaligt, at vit ikki innsíggja trupulleikan og gera okkurt við hann, sigur leiðarin á Fjordskolen avgjørdur.

Mentamálaráðið:

# Eitt tilboð kemur í skúlaárinum

**Tað eru onnur enn Ingvald á Kamarinum, sum eru áhugað í at veita børnum við atferðartrupulleikum serlig tilboð, men hesi fáa øll fundarboð í næstum, sigur Mentamálaráðið**

MENTAN
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Olaus Jespersen, leiðari á fólkaskúladeildini í Mentamálaráðnum, sigur, at Mentamálaráðið arbeiðir við spurningunum um at fáa eitt serligt tilboð tið næmingar við atferðartruplumnæmingum. Ingvald av Kamarinum og Fjordskolen er ein av teimum, sum hava víst áhuga, men tað eru fleiri onnur eisini.

– Og vit ætla at hava ein fund við hesi áhugaðu fólkini ein av fyrstu døgunum, sigur Olaus Jespersen. Mentamálaráðið hevur tó ikki givið fundarboð enn, men tá fundurin skal vera um ikki so langa tíð, fáa fólk helst boðini skjótt.

Olaus Jespersen vísir á, at landsstýrismaðurin ikki fekk neyðugu heimildirnar fyri at kunna at veita næmingum við atferðartrupulleikum serlig tilboð, fyrr enn 7. juni í ár. Í dag skriva vit 30. oktober, men framvegis er einki ítøkiligt hent á økinum. Olaus Jespersen metir tó, at vit í hesum skúlaárinum kunnu rokna við onkrum tilboði til næmingar við atferðartrupulleikum.

– Tað verður tað nokk, og pengar eru eisini til tað, sigur hann. Talan er tó ikki um meiri enn eina hálva millión – tað vil siga nakað sum minnir um tvær læraralønir. Tað ljóðar ikki av nógvum, men sambært Olaus Jespersen verður tað tilboðið, sum kemur, fyri hesar 500.000 krónurnar.

